| Gerðabók býráðsins | |
|---|---|
| Fundardagur: | 27. november 2014 |
| Býráðsfundur nr. | 13/2014 |
| Borgarstjóri | Sonni á Horni |
| Fundarskrivari | Jákup Frants Larsen |
| | |

Ár 2014 tann 27. november kl. 16.30 varð býráðsfundur hildin í býráðssalinum, hetta sambært skriv frá borgarstjóranum, dagfest 20. november 2014 um innkalling til fundar.

**Møtt vórðu:**

Sonni á Horni
Magnus S. Midjord
Sigga Óladóttir Joensen
Sigurð S. Simonsen
Dánjal Vang
Petur Abrahamsen
Eyðun á Lakjuni
Árant Berjastein
Birgir Petersen

Við á fundinum luttók eisini Marin S. Thomsen, fíggjarleiðari, meðan mál nr. 41/2014 varð viðgjørt og avgerð tikin.

**Skrivari:** Jákup Frants Larsen, býráðsskrivari

**Mál nr. 41/2014.**

**2. viðgerð av uppskoti til fíggjarætlan fyri kommununa fyri 2015.**

Fíggjarnevndin hevur móttikið uppskot frá fyrisitingini, dagfest 12. november 2014 til fyribils fíggjarætlan fyri kommununa fyri ár 2015, har uppskotini frá føstu nevndunum eru tikin við inn í uppskotið.

Vísandi til grein 39, stk. 1 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mei 2000 um kommunustýri við gildiskomu tann 1. januar 2001, so skal fíggjarnevndin fyri 1. oktober leggja uppskot til fíggjarætlan fyri býráðið. Sambært stk. 2 í somu grein stendur, at kommunustýrið skal viðgera uppskot til fíggjarætlan 2 ferðir við í minsta lagi 14 daga millumbili, og skal ætlanin verða endaliga samtykt í seinasta lagi 1. desember.

Fíggjarnevndin hevur á fundi 19. november 2014 viðgjørt uppskot til 2. og endaligu viðgerð í býráðnum 27. november 2014, og mælir nevndin á fundi 19. november há. býráðnum til at góðkenna hjálagda uppskot til fíggjarætlan kommununar fyri 2015.

Nevnast skal, at viðgerð hevur verið í nevndini tann 17. september 2014 í sambandi við uppskoti til 1. viðgerð (karmar) og á býráðsfundi tann 25. september. Eftir býráðsfundin hava nevndirnar viðgjørt uppskot til fíggjarætlan fyri teirra øki, bæði viðvíkjandi rakstri og íløgum, sum løgd vórðu fyri arbeiðsfund býráðsins.

Hesir arbeiðsfundir (temadagar) varð hildin millum alt býráðið tann 12. og 13. november 2014, somuleiðis sum víðari viðgerð hevur verið á fundi í fíggjarnevndini tann 19. november 2014. Á arbeiðsfundunum vórðu býarverkfrøðingurin og leiðarin á sosialu deildini innkallað til fundar fyri at geva frágreiðingar um teirra økir.

Rakstrarútreiðslurnar brutto verða mettar til kr. 72.758.348,00, netto til kr. 40.581.581,00, rentuútreiðslur og rentustuðul til kr. 3.372.000,00, avdráttirnir av føstum lánum til kr. 2.000.000,00 og íløgurnar brutto til kr. 30.570.000,00 og netto til kr. 22.970.000,00.

*Talan verður um hesar íløgur brutto:*

| | | |
|---|---|---|
| Øki 2. Almanna og heilsumál | kr. | 6.560.000,00 |
| Øki 3. Børn og ung | kr. | 300.000,00 |
| Øki 4. Undirvísing | kr. | 2.440.000,00 |
| Øki 5. Mentan og frítíð | kr. | 2.950.000,00 |
| Øki 6. Teknisk mál | kr. | 9.220.220,00 |
| Øki 7. Kommunal virki | kr. | 9.100.000,00 |
| **Samantals:** | **kr.** | **30.570.000,00** |

Roknað verður við íløguinntøkum á øki 2 upp á kr. 6.400.000,00, øki 5 kr. 600.000,00 og øki 6 kr. 600.000,00. Talan er sosatt um samlaðar íløguinntøkur upp á kr. 7.600.000,00. Nettoíløgurnar verða sostatt mettar til kr. 22.970.000,00.

Íløgur í øki 2 "Almanna- og heilsumál" kr. 6.560.000,00 eru kr. 6.400.000,00 settar til íløgur í eldraøkið. Peningur til keyp av lendi á vestara landinum til heimið varð avsettur í 2014 og verður útreiðsluførdur í hesum ári, somuleiðis sum talan varð um samlað lendiskeyp til hetta endamál, eins og til gongugøtuna Kambsdal/Fuglafjørður og til sethúsaútstykking. Kr. 110.000,00 eru avsettar til barnatannrøktina og kr. 50.000,00 til vindfang til Vesturstovu.

Íløgur í øki 3: Børn og ung" kr. 300.000,00 eru Stropan og Kamb. Íløgur í øki 4: Undirvísing kr. 2.440.000.000,00 eru til nýbygging av skúla kr. 2.000.000,00 og kr. 440.000,00 og til undirvísingaramboð. Íløgur í øki 5: Mentan og frítíð kr. 2.350.000,00,00 eru til nýtt graslíki vm., kr. 200.000,00 til uppstigan av Mentanarhúsinum og kr. 50.000,00 til íløgur í Piddasahandil. Íløgur í øki 6: Teknisk mál kr. 9.220.000,00 eru til nýggjar vegir, kloakkir, útstykkingar, vatnveitingar, lendiskeyp vm.

Íløgur í Fuglafjarðar havn øki 7 kr. 9.100.000,00 verða útgreinaðar soleiðis, at kr. 5,0 mió. verða avsettar til útfylling/planering/bryggjukant til fóðurgoymslu hjá Havsbrún, kr. 600.000,00 til asfaltering kring Pelagos/Bergfrost, kr. 500.000,00 til stuðlamúr á økinum frá Arbeiðsmannafelagshúsinum til Vónina og kr. 3.000.000,00 til planering av økinum á Enninum til Vónina.

Mælt verður býráðnum til at lána kr. 6.000.000,00, og at nýta kr. 7.000.000,00 av innistandandi peningi til partvísar íløgur.

Inntøkurnar av A+B skatti verða mettar til kr. 49.708.581,00 við skattaprosenti 21,5%, skattur av kapitaleftirlønum til kr. 0,00, meðan partafelagsskatturin verður mettur til kr. 6.200.000,00. Samlaðu skattainntøkurnar verða sostatt mettar til kr. 55.908.581,00.

Skatturin av kapitalpensjónum mettur kr. 700.000,00 verður fluttur upp á inntøkurnar frá landskassanum til eldraøkið. Endurgjaldið verður sostatt broytt úr kr. 13,3 mió. upp í kr. 14,0 mió. Samlaðu rakstrarútreiðslurnar á eldraøkinum verða mettar til kr. 15,960 mió.

Barnafrádrátturin í kommunuskattinum verður sami sum í 2014 kr. 5.500,00 pr. barn.

Annars eru kr. 550.000,00 avsettar til liðuggerð við skriving og tilrættalegging av 4 bindum av Fuglafjarðar søgu, soleiðis at útgávan kann verða fingin frá hondini fyrst í 2016. Somuleiðis eru kr. 200.000,00 avsettar til Bindifestivalin, har játtanin til mentan, ítrótt og list er hækkað við nevndu upphædd upp í kr. 990.000,00.

Avsetingin av lønum undir brunaverkið á øki 7 eru hækkaðar við kr. 240.000,00, við tað at miðað verður fram ímóti at brunaleiðarastarvið verður sett fulla tíð, eitt nú við atliti til, at alt størri krøv verða sett brunaleiðaranum, eftir at nýggj byggilóg, sum eisini umfatar bruna verður sett í gildi á vári 2015.

Sum lýst omanfyri verða kr. 7,0 mió. nýttar av innistandandi peningi til íløgur, meðan ætlanin er at lána pening til íløgur upp á tilsamans kr. 6,0 mió.. Hetta førir við sær, at skuld kommununar verður økt við kr. 4,0 mió., við tað at kr. 2,0 mió. verða rindaðar í avdráttum av lánum kommununar í 2015. Hesi viðurskifti føra við sær, at mett verður, at lánskuld kommununar netto við árslok 2015 verður umleið 80% av eini álíkning við skattaprosenti 23,0%.

Hjálagt verður sent yvirlit yvir metta nettoskuld kommununar pr. 13. november 2014 eins og íløguyvirlit hjá fíggjarnevndini fyri 2015.

Uppskotið til fíggjarætlan fyri 2015 javnvigar við ***kr.108.728.348,00*** við einum avlopi upp á kr. 0,00.

Uppskotið hevur sum nevnt verið til 1. viðgerð á býráðsfundi tann 25. september 2014 og varð samtykt at beina tað aftur í fíggjarnevndina til víðari viðgerðar fyri síðan at leggja uppskot fyri býráðið til 2. viðgerð, sum nú við hesum verður gjørt.

Fíggjarætlanaruppskotið hevur sum nevnt frammanfyri verið til viðgerðar í fíggjarnevndini tann 19. november 2014 og verða hervið við tilmæli lagt fyri býráðið tann 27. november 2014 til viðgerðar og samtyktar.

**Avgerð:**
Broytingaruppskot frá vinnunevndini, dagfest 27. november: " Uppskot um leingjan av frystikei". Skotið verður upp, at avsettar verða kr. 12,0 mió til at leingja frystikeina 60-70 metrar heimeftir. Fíggingin:
Søla av tunnlum kr. 7,0 mió.

| | |
|---|---|
| Meirinntøka A skattur | kr. 1,0 mió. |
| Meirinntøka P/F Skattur | kr. 1,0 mió. |
| Meirinntøka havnin | kr. 1,0 mió. |
| Lántøka | kr. 2,0 ,mió. |
| **Samantals** | **kr. 12,0 mió.** |

Broytingaruppskotið varð samtykt., 5 atkv. Fyri og 4 atkv. Ímóti. Ímóti atkvøddu Sonni á Horni, Sigga Óladóttir Joensen. Árant Berjastein og Petur Abrahamsen.

Broytingaruppskot frá Birgiri Petersen, dagfest 27. november 2014, har skotið verður upp at seta kr. 1,0 mió av til "Gongubreyt fram við landsvegnum" millum Kambsdal og Fuglafjørð. Fíggingin verður tikin frá øki 6 við at lækka játtanina til Bøvegur leingjan 200 metrar.

Upprættað verður nýtt kontostað við heitinum "Gongubreyt Kambsdalur/Fuglafjørður fram við landsvegnum".

Íløgur øki 2 "Almanna- og heilsumál" umfatar millum annað lendiskeyp eisini lendi til gongugøtu Kambsdal/Fuglafjørð. Íløgur í øki 6 "Teknisk mál" umfata nýggjar vegir o.a. íalt kr. 9,2 mió.

Broytingaruppskotið varð samtykt., 5 atkv. Fyri og 4 atkv. Ímóti. Ímóti atkvøddu Sonni á Horni, Sigga Óladóttir Joensen. Árant Berjastein og Petur Abrahamsen. Sostatt er talan um játtan upp á kr. 500.000,00, við tað at kr. 500.000,00 eru játtaðar undir íløgur undir øki 6 teknisk mál. Hesar upphæddir verða fluttur til serstaka játtan við omanfyri nevnda teksti.

At enda varð atkvøtt um tilmælið frá fíggjarnevndini við teimum samtyktu broytingunum, hetta vísandi til § 14, 2. petti í góðkendu fundarskipanini fyri kommununa. Fíggjarætlanin 2015 við broytingunum varð samtykt. 5 atkv. fyri og 4 atkv. Ímóti. Fyri atkvøddu Sigurð S. Simonsen, Magnus S. Midjord, Eyðun á Lakjuni, Dánjal Vang og Birgir Petersen. Ímóti atkvøddu Sonni á Horni, Sigga Óladóttir Joensen, Árant Berjastein og Petur Abrahamsen.

Teir býráðslimir, sum atkvøddu ímóti kravdu niðanfyri standandi viðmerking í gerðabókina:

Tað skal hervið gerast vart við, at grundin til, at undirritaðu ikki tóku undir við broyttu fíggjarætlanini er grundað á, at undirritaðu meta, at broytingin kemur at belasta fíggjarætlanina meira enn gott er, við nýbyggjan av skúla, útbyggja ella nýbygging av Vesturstovu.

Somuleiðis grundað á, at tað kom fram á fundinum, at henda broyting kemur at hava stóra ávirkan á møguliga lántøku fyri ár 2016.

## <u>Mál nr. 42/2014.</u>

**Viðvíkjandi áheitan um eykajáttan til íløgur í Fuglafjarðar havn.**

Vinnunevndin hevur á fundi tann 21. oktober 2014 staðfest, at fyritreytirnar viðvíkjandi íløgum í Fuglafjarðar havn eru munandi broyttar í sambandi við, at Pelagos hevur bygt stórt uppisjóvarvirki á havnarøkinum og neyðugt er at gera íløgur í økið rundan um virkið og Bergfrost.

Tí mælir vinnunevndin til, at kr. 1,1 mió. frá viðlíkahaldskontoini hjá Fuglafjarðar havn, rakstrarstað 07.38.15.530.10 konto 160001 verður flutt til Íløgur í havnina, rakstrarstað 07.38.15.531.10 konto 310001 til ávegis liðuggerð av økinum við Pelagos og Bergfrost.

Til viðlíkahald av Fuglafjarðar havn eru í fíggjarætlanini fyri 2014 avsettar kr. 1,8 mió. og brúktar eru higartil umleið kr. 600.000,00.

Málið hevur verið fyri á fíggjarnevndarfundi tann 22. oktober 2014, og tekur nevndin tekur undir við áheitanini frá vinnunevndini um eykajáttan til íløgur í Fuglafjarðar havn. Mælt verður býráðnum til at veita eina eykajáttan til umflyting av kr. 1,1 mió. Frá rakstrarstaði 07.38.15.530.10 konto 160001 "umvælingav av havnini" til rakstrarstað 07.38.15.531.10 konto 310001 "íløgur í havnina", hetta sambært § 41, stk. 2 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri.

Talan verður sosattt bert um eina tekniska umflyting av rakstrarjáttan til íløgujáttan, sum ikki kostar kommunukassanum pening, grundað á at arbeiðið talan er um at gera kring virkini Pelagos og Bregfrost verður mett sum íløga í havnina og ikki umvælingar.

Staðfest er, at kr. 1,8 mió. eru avsettar á rakstrarstaði 07.38.15.530.10 á konto 160001: "Umvælingar av havnini", og við eini eykajáttan upp á kr. 1,1 mió. verður játtanin broytt til kr. 700.000,00. Hinvegin eru avsettar kr. 10,3 mió. á rakstrarstaði 07.38.14.531.10 konto 310001 og við eini umflyting við eykajáttan verður íløgujáttanin hækkað við kr. 1,1 mió. úr kr. 10,3 mió. upp í kr. 11,4 mió.

Ein eykajáttan, sum henda, førir ikki eina útreiðslu við sær, sum hevuir beinleiðis ávirkan á roknskap kommununar fyri 2014 við tað av talan er um umflytingar frá rakstrarkonto til íløgukonto á øki 7 í fíggjarætlan kommununar.

Tá ið talan er um eina eykajáttan, skal málið hava 2 viðgerðir í býráðnum við í minsta lagi 14 daga millumbili, hetta sambært § 41, stk. 2 í løgtingslóg nr. 87 frá 17 mei 2000 um kommunustýri, og skal endaliga avgerðin verða kunnað Fíggjarmálaráðnum í seinasta lagi 3 dagar aftaná samtyktina við 2. viðgerð, hetta sambært § 53, stk. 2,3 í somu lóg.

Málið hevur verið til 1. Viðgerð á býráðsfundi tann 30. oktober 2014 og vórðu tilmælini frá vinnu- og fíggjarnevndini samtykt við teirri viðmerking, at tekniska deild kannar eftir og ger upp, hvat er kommununar partur av økinum og hvat er parturin hjá virkjunum á økinum.

Samtykt varð at beina málið til aðru viðgerð á komandi býráðsfundi í november 2014.

**Avgerð:**
Samtykt varð við 2. viðgerð at góðkenna eykajáttanina millum rakstur og íløgur í Fuglafjarðar havn, hetta sambært tilmælunum frá vinnu- og fíggjarnevndini í málinum. (9-0).

## Mál nr. 43/2014.

**Mál viðvíkjandi eykajáttan til íløgur í Stropan.**

Fíggjarnevndin hevur móttikið frágreiðing frá fyrisitingini um, at avsettar eru kr. 310.000,00 til íløgur í Stropan, rakstrarstað 03261153110 konto 310001 fyri 2014, men sambært fyriliggjandi uppgerð, so eru nýttar kr. 559.148,00 ella kr. 249.148,00 meira enn mett.

Tá eru rokningar upp á kr. 87.578,50 frá Heildarverk frá 2013 tiknar við. Hetta eru sum lýst rokningar frá 2013, sum Fuglark hevur ligið inni við, og sum kommunan ikki hevur móttikið fyrr enn í oktober 2014.

Haraftrat er staðfest, at ein sølufakturi fyriliggur frá Innspark.fo upp á kr. 373.468,75 til íløgur í spælipláss við Stropan, og her er avtala gjørd millum kommununa og felagið um, at kr. 300.000,00 skulu rindast í 2014 (er flutt) og restin kr. 73.468,75 skulu rindast í 2015.

Sostatt verður talan um eina samlaða nýtslu til íløgur í Stropan upp á kr. 633.000,00, sum er 333.000,00 omanfyri ta játtan, sum býráðið hevur samtykt at veita íløgum í Stropan á fíggjarætlanini fyri 2014.

Við tað at nevndin ikki hevði rætt grundarlag at viðgera eykajáttanina, so varð boð sent eftir býarverkfrøðinginum, sum møtti á fundinum. Hann greiddi frá rokningunum hjá Heildarverk, har hann hevði spurt eftirlitið fyrst í árinum, um nakrar rokningar fyri 2013 lógu eftir. Svarið varð noktandi. Býarverkfrøðingurin greiddi frá, at talan var um rokningar fyri eykaarbeiðir, sum felagið hevði gjørt, og at hesi ikki vórðu umfatað av tilboðnum í sambandi við bygging av Stropanum.

Hinvegin upplýsti hann, at Fuglark ikki hevði sent kommununi rokningar fyri eftirlit í langa tíð, og kundi talan verða um sera stórar upphæddir eitt í ringasta føri milliónir.

Fíggjarnevndin viðgjørdi málið á fundi 22. oktober 2014 og varð avgerð tikin um , at fundur skuldi verða hildin við Fuglark beinanvegin fyri at fáa greiði á fíggjarligu viðurskiftiunum, áðrenn ein endalig viðgerð kom at verða av eini møguligari eykajáttan til íløgur í Stropan.

Málið hevur aftur verið til viðgerðar á fundi í fíggjarnevndini tann 19. November 2014 og mælir nevndin býráðnum til at veita eina eykajáttan á kr. 333.000,00 til íløgur í Stropan, rakstrarstað 03261153110 konto 310001 fyri fíggjarárið 2014, hetta sambært § 41, stk. 2 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri.

Fíggingin verður fingið til vega av meirinntøkum av A+B skatti, hetta vísandi til somu grein í omanfyri standandi lóg. Staðfest er pr. d.d., at kommunan hevur fingið umleið kr. 3,7 mió. meira í kommunuskatti enn mett teir fyrstu 10 mánaðarnar av árinum.

Sostatt metir nevndin, at eingin trupuleiki skuldi verið fyri, at eykajáttanin verður veitt av meirskatti. Tó hevur kommunan framt eykajáttanir higartil fyri kr. 3.170.000,00, sum eru fíggjaðar av meirskatti og møguligari lántøku.

Ein eykajáttan, sum henda førir eina útreiðslu við sær, sum hevur beinleiðis ávirkan á roknskap kommununar fyri 2014.

Tá ið talan er um eina eykajáttan, skal málið hava 2 viðgerðir í býráðnum við í kinsta lagi 14 daga millumbili, hetta sambært § 41, stk. 2 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri, og skal

endaliga avgerðin verða kunnað Fíggjarmálaráðnum í seinasta lagi 3 dagar aftaná samtyktina við 2. Viðgerð, hetta sambært § 53, stk. 2.3 í somu lóg.

**Avgerð:**
Samtykt varð at taka taka undir við tilmælinum frá fíggjarnevndini og beina málið til 2. og endaliga viðgerð á komandi býráðsfundi, sum hildin verður 11. desember 2014. (8-0).

Meðan málið varð viðgjørt og avgerð tikin varð Sigga Óladóttir Joensen ikki á fundi vegna ógjegni.

## Mál nr. 44/2014

**Mál viðvíkjandi eykajáttan til rakstur til Stropan.**

Fíggjarnevndin hevur móttikið skriv frá sosialu nevndini, dagfest 07. november 2014 um, at játtanin til Stropan ikki strekkir til restina av árinum. Í hesum sambandi verður víst til umsókn frá Stropanum, dagfest 06. november 2014 við frágreiðing til sosialu nevndina um eina møguliga eykajáttan til hall á kr. 100.000,00.

Talan er í stóran mun um ovurnýtslu í sambandi við lønum til avloysarar, og at einki er avsett til arbeiðsmarknaðargjøld, umleið kr. 130.000,00, ið er orsøkin til hallið.

Umsóknin hevur verið til viðgerðar í sosialu nevndini tann 07. November 2014 og tekur nevndin undir við áheitanini frá Jógvani Philbrow, leiðara á Stropanum, og heitir á fíggjarnevndina um at veita eina eykajáttan til rakstur á Stropanum upp á kr. 100.000,00.

Sambært fíggjarætlan kommununar fyri 2014 eru avsettar kr. 4.050.000,00 á rakstrarstaði 03261153015 konto 110001, so um ein eykajáttan verður veitt á kr. 100.000,00, so verður játtanin hækkað upp í kr. 4.150.000,00. Sambært budgetsaldolistanum eru pr. d.d. nýttar kr. 3.654.994,00 til fastar lønir, tímalønir, eftirlønir og arbeiðsmarknaðargjøld.

Málið hevur aftur verið til viðgerðar á fundi í fíggjarnevndini tann 19. november 2014 og mælir nevndin býráðnum til at veita eina eykajáttan á kr. 100.000,00 til rakstur í Stropan, rakstrarstað 03261153015 konto 110001 fyri fíggjarárið 2014, hetta sambært § 41, stk. 2 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri.

Fíggingin verður fingið til vega av meirinntøkum av A+B skatti, hetta vísandi til somu grein í omanfyri standandi lóg. Staðfest er pr. d.d., at kommunan hevur fingið umleið kr. 3,7 mió. meira í kommunuskatti enn mett teir fyrstu 10 mánaðarnar av árinum.

Sostatt metir nevndin, at eingin trupuleiki skuldi verið fyri, at eykajáttanin verður veitt av meirskatti. Tó hevur kommunan framt eykajáttanir higartil fyri kr. 3.170.000,00, sum eru fíggjaðar av meirskatti og møguligari lántøku.

Ein eykajáttan, sum henda førir eina útreiðslu við sær, sum hevur beinleiðis ávirkan á roknskap kommununar fyri 2014.

Tá ið talan er um eina eykajáttan, skal málið hava 2 viðgerðir í býráðnum við í kinsta lagi 14 daga millumbili, hetta sambært § 41, stk. 2 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri, og skal endaliga avgerðin verða kunnað Fíggjarmálaráðnum í seinasta lagi 3 dagar aftaná samtyktina við 2. viðgerð, hetta sambært § 53, stk. 2.3 í somu lóg.

**Avgerð:**
Samtykt varð at taka taka undir við tilmælinum frá fíggjarnevndini og beina málið til 2. og endaliga viðgerð á komandi býráðsfundi, sum hildin verður 11. desember 2014. (8-0).

Meðan málið varð viðgjørt og avgerð tikin varð Sigga Óladóttir Joensen ikki á fundi vegna ógjegni.

## Mál nr. 45/2014.

**Mál viðvíkjandi eykajáttan til "Ung í arbeiði"**

Fíggjarnevndin hevur móttikið fráboðan frá fyrisitingini um, at játtanin, sum býráðið hevur veitt til ung í arbeiði á fíggjarætlanini fyri 2014 ikki skal liggja í øki 6 "Tekniks mál", men undir øki 3 "Børn og ung". Tí verður neyðugt at gera eina tekniska eykajáttan millum hesi bæði økir, sum ber við sær at játtanin verður flutt.

Sambært góðkendu fíggjarætlanini fyri 2014 vórðu avsettar kr. 300.000,00 á øki 6, rakstrarstaði 06381153010 "vegir" konto 160001, men verður sambært Fíggjarmálaráðnum neyðugt at flyta játtanina til øki 3, rakstrarstað 03241253010 "Ung í arbeiði" konto 111200.

Sostatt kemur konto 160001 á vegakontoini at verða lækkað úr kr. 1.000.000,00 niður í kr. 700.000,00, meðan játtanin til ung í arbeiði á øki 3 verður hækkað við kr. 300.000,00.

Hinvegin er staðfest, at nýtslan á rakstrarstaði 03241253010 "Ung í arbeiði" fyri allar konti hevur verið pr. d.d. kr. 480.755,00, og er her sostatt talan um eina meirnýtslu upp á kr. 180.755,00 í mun til upprunajáttaanina.

Málið hevur aftur verið til viðgerðar á fundi í fíggjarnevndini tann 19. november 2014 og mælir nevndin býráðnum til at veita eina eykajáttan á kr. 180.755,00 til "Ung í arbeiði", rakstrarstað 03241253010 allar konti fyri fíggjarárið 2014, hetta sambært § 41, stk. 2 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri.

Somuleiðis verður mælt býráðnum til, at flyta kr. 300.000,00 frá øki 6, rakstrarstaði 06381153010 til øki 3 "Ung í arbeiði" rakstrarstað 03241258010, soleiðis at samlaða játtanin til Ung í arbeiði kemur at verða kr. 480.755,00, sum er staðfesta nýtslan.

Fíggingin verður fingið til vega av meirinntøkum av A+B skatti, hetta vísandi til somu grein í omanfyri standandi lóg. Staðfest er pr. d.d., at kommunan hevur fingið umleið kr. 3,7 mió. meira í kommunuskatti enn mett teir fyrstu 10 mánaðarnar av árinum.

Sostatt metir nevndin, at eingin trupuleiki skuldi verið fyri, at eykajáttanin verður veitt av meirskatti. Tó hevur kommunan framt eykajáttanir higartil fyri kr. 3.170.000,00, sum eru fíggjaðar av meirskatti og møguligari lántøku.

Ein eykajáttan, sum henda førir eina útreiðslu við sær, sum hevur beinleiðis ávirkan á roknskap kommununar fyri 2014.

Tá ið talan er um eina eykajáttan, skal málið hava 2 viðgerðir í býráðnum við í kinsta lagi 14 daga millumbili, hetta sambært § 41, stk. 2 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri, og skal endaliga avgerðin verða kunnað Fíggjarmálaráðnum í seinasta lagi 3 dagar aftaná samtyktina við 2. viðgerð, hetta sambært § 53, stk. 2.3 í somu lóg.

**Avgerð:**
Samtykt varð at taka taka undir við tilmælinum frá fíggjarnevndini og beina málið til 2. og endaliga viðgerð á komandi býráðsfundi, sum hildin verður 11. desember 2014. (9-0). Gjørt varð vart við av Birgiri Petersen, at játtanin, sum býráðið hevur veitt til eitt nú til ung í arbeiði í fíggjarætlanini fyri 2014 skal halda.

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 21.45.

Magnus S. Midjord

Sigga Óladóttir Joensen

Dánjal Vang

Eyðun á Lakjuni

Petur Abrahamsen

Sigurð S. Simonsen

Árant Berjastein

Birgir Peteresn

Sonni á Horni

Skrivari:

Jákup Frants Larsen